# Hús brend í grund í Víkarbyrgi

**Tað kom eigaranum ógvuliga dátt við, tá ið hann sá, at húsini, sum akkurát hava fingið heilt stórar umvælingar, vóru brend í grund um náttina**

ELDSBRUNI
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*Sum tað sæst, er bara grundin og oljutangin efti ,r Hjallurin, sum stóð omanfyri húsini, er eisini brendur*

**Víkarbyrgi:** Ongin hevur ánilsi av, hvat hendi, tá ið heldur kom í eini hús í Víkarbyrgi mikunáttina.

Tað vóru húsini í Hamrabyrgi, sum stóðu einsamøll hinumegin ánna í Víkarbyrgi, sum brendu í grund hesa náttina.

Tey, sum áttu húsini, høvdu verið har kvøldið fyri og vóru farin av bygdini um níggjutíðina um kvøldið.

Men tá ið tey komu aftur 12 tímar seinni, klokkan níggju mikumorgunin, vóru húsini vekk. Fullkomiliga brend í grund!

Tað einasta, sum er eftir, er oljutangin og sjálv húsagrundin. Alt hitt er øska. Hjallurin, sum stóð omanfyri húsini, er eisini vekk, men seyðhúsið, sum stendur niðanfyri húsini, brendi ikki.

At ongin hevur ánilsi av, hvat hendi, er kanska ikki so løgið, tí ongin býr í Víkarbyrgi longur.

Bygdin varð avtoftað fyri nøkrum árum síðani og síðani hava tey trý gomlu sethúsini í bygdini meiri og minni bara verðið brúkt til frítíðarhús.

Sostatt sá ongin, tilburðin. Veðrið var heldur onki serligt, so ongin útróður hevur verið og tað hava heldur ongi onnur skil siglt framvið um náttina.

Húsini eru umleið 100 ára gomul, men tey hava verið sera vælhildin bæði innan og uttan alla tíðina.

Og nú tey brendu, vóru eigararnir júst í ferð við at leggja síðstu hond á eina ógvuliga umfatandi ábót á húsini, sum tey hava arbeitt uppá í tríggjar vikur.



*Nakrar samankrúllaðar takplátur liggja niðri í húsagdundini*

# Frystigoymslan í Vági stongd

**Tað er so lítil fiskur á goymslu, at tað er ikki grundarlag fyri at hava hana opna, sigur Johan Dahl, men hann væntar, at hon letur uppaftur um stutta tíð**

VINNUMÁL
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin*



*Nú er tann stóra frystigoymslan í Vági eisini stongd, men Johan Dahl, sum er ein av eigarunum, væntar, at hon letur upp aftur um stutta tíð.Hígartil hava bøgdirnar á goymslu kortini ikki verið nóg mikið til at fáa lønandi rakstur*

Vágur: Tað er synd at siga, at vágbingar hava viðrák í løtuni. Eitt arbeiðsplás fyri og annað eftir eru latin aftur, ella hava skert virksemið.

Og nú er tann stóra frystigoymslan á bryggjuni eisini stongd.

– Tað hevur verið so lítil fiskur á goymslu, at tað er ikki grundarlag fyri at hava hana opna í løtuni, sigur Johan Dahl, sum er ein av eigarunum.

Felagið hjá Johan Dahl, sum eitur Faromar, eigur 20% av frystigoymsluni og útlendingar eiga hini 80%.

### Arbeiða við eini varandi loysn

Fyri at spara útreiðslur verður goymslan sostatt latin aftur, streymurin sløktur, eins og tey trý fólkini, sum arbeiddu á goymsluni, eru søgd upp og eru farin til hús.

Tað mesta av vøruni fór av goymsluni um ársskiftið og og tað síðsta fór í næstseinastu viku.

Hann sigur, at eftir at Orcades Viking, sum legði nógvan fisk upp á frystigoymsluni, varð seldur, viknaði grundarlagið undir frystigopymsluni munandi.

Í eini roynd at at veksa um virksemið aftur, ætlaði Johan Dahl at leiga írska nótaskipið, Veroniku, men tað datt eisini niðurfyri.

Ístaðin fekst sáttmáli við russarar um at leggja upp í Vági og teir løgdu eisini nakað upp í Vági í fjør og sáttmáli er um at leggja fisk á goymslu aftur í ár.

Men Johan Dahl leggur dent á, at arbeitt verður við at finna eina varandi loysn fyri lønandi rakstri og hann væntar eisini, at hon fer at lata uppaftur um stutta tíð.

– Russarir eru farnir undir fiskiskap aftur og vit vænta, at teir fara at leggja fisk upp aftur um ein góðan mánað.

Hann sigur tó eisini, at tað, sum russarar løgdu upp í fjør, er ikki nóg mikið til at fáa lønandi rakstur í goymsluna og tí vónar vónar hann eisini at fáa vørur aðrastaðni frá.

Men hann ásannar kortini, at frystigoymslan gav hall bæði í fjør og í fyrrárið og tann gongdin má vendast. Fæst ikki lønandi rakstur, sigur tað seg sjálvt, at hon heldur heilt uppat.

Johan Dahl sigur, at norðaneftir fæst ongin fiskur á goymslu, tí tað loysir seg ikki, eftir at flutningsstuðulin varð tikin av.

Annars goymdi frystigoymslan í Vági ikki sørt av fiski fyri Føroya Fiskavirking og rækjuvirkið á Oyri, men tá ið flutningsstuðulin fall burtur, varð grundarlagið eisini tikið undan tí.



# Uppsøgnir í smiðjuvinnuni

**So lítið er at gera hjá stóru smiðjunum í Eysturoynni, at fleiri hava verið noyddar at siga fólki úr starvi**

ARBEIÐS-MARKNAÐUR
*Jón Brian Hvidtfeldt*
*jonbrian@sosialurin.fo*




*KJ-Hydraulik á Kambsdali segði í vikuni tveimum fólki úr starvi. Eisini FJM í Runavík og Normek í Gøtu hava sagt ávíkavist fimm og tveimum fólkum úr starvi seinastu vikuna*

Afturgongdin í ali- og fiskivinnuni breiðir seg sum ringar í sjónum til stóru smiðjurnar í Eysturoynni. Fleiri teirra hava verið noyddar at siga fólki úr starvi, tí arbeiði er ikki til allar hendur.

Seinastu vikuna hevur smiðjan hjá FJM í Runavík sagt fimm mans úr starvi, KJ-Hydraulik á Kambsdali hevur sagt tveimum monnum úr starvi, og hjá Normek í Gøtu eru somuleiðis tveir mans uppsagdir. Hjá Skipasmiðjuni á Skála er somuleiðis minni at gera, men í hesum umfari eru fólk ikki send til hús.

### Viðkvom vinna

Felags fyri nevndu arbeiðspláss er, at teirra arbeiði er tengt at gongdini í fiski- og/ella alivinnuni.

Og nú byrjar at sansa at við vánaligum fiskaprísum, umframt at alivinnan hevur verið í djúpari kreppu í longri tíð, verður minni peningur nýttur til eitt nú umvælingararbeiði.

Hjá FJM í Runavík hava starvast 40 fólk, men í vikuni vóru fimm mans sagdir úr starvi. Síðan smiðjan herfyri var liðug við stóra arbeiðið á Kollafjord Pelagic hevur lítið verið at gjørt.

– Vit hava í eina tíð sæð, hvønn veg tað bar. Lítið hevur verið av nýggjum arbeiði, síðan vit vóru lidnir í Kollafirði, og tí hevur ikki verið grundarlag fyri at hava so nógv fólk til arbeiðis, sigur Jóhan Hendrik Olsen, ein av fýra eigarum í FJM.

Hann vísir á, at ein stórur trupulleiki hjá vinnuni er, at hon ikki dugir nóg væl at satsa uppá útlandið.

– Sum heild duga vit ikki nóg væl at fáa útlendsk skip hendavegin til umvælingar.

### Uppsteðgað

Hjá KJ-Hydraulik á Kambsdali varð stjórin, Ólavur Asafsson Olsen, noyddur at siga tveimum monnur úr starvi í hesi vikuni.

– Tað sær svart út. Alivinnan er uppsteðgað, og fiskivinnan hevur tað ikki gott. Tað ávirkar so okkum, tí spart verður uppá viðlíkahald, og tí verður minni hjá okkum at gera, sigur Ólavur Asafsson Olsen.

Stjórin á KJ-Hydraulik, har 58 fólk eru til arbeiðs, vísir á, at alt árið í fjør vóru einans 3-4 vikur, har ov lítið lítið var at gera. Men í ár hevur alt ov lítið verið at gjørt allar vikur uttan tvær tær fyrstu vikurnar av januar.

Spurdur, hvørt fleiri uppsøgnir eru í væntu, sigur Ólavur Asafsson Olsen, at tað sjálvandi er ringt at siga.

– Tað er ringt at siga, men eg vóni tað ikki. Men tað krevur so, at støðan ikki versnar meira.

### Nýggj skip

Eisini í smiðjuni hjá Normek í Gøtu er minni at gera, og tí vóru tveir mans uppsagdir seinasta fríggjadag, sigur Robert Langgaard, stjóri. Tá mest hevur verið at gera hava tey verið 25 fólk til arbeiðis, men nú er talið komið niður á 20.

Millum viðskiftafólkini hjá Normek eru serliga nótaskipini í Gøtu, Cubatrolarnir og skipini hjá Ásmundi Justinussen. Men fleiri av gomlu skipunum hjá hesum reiðaríum eru skift út við onnur og nýggjari skip, ið krevja færri umvælingar, og tað er ein av orsøkunum til at arbeiðið minkar.

– Arbeiðið er nógv minkað, og útlitini eru heldur ikki tey bestu, heldur Robert Langgaard.

Fyri at fáa arbeiði hevur smiðjan lagt seg eftir millum annað at umvæla lastbilar.

– Tað gevur nakað av arbeiði, og í samband við arbeiðið í Norðoyatunnlinum vænta vit at tað fer at kasta nakað av till okkara, sigur Robert Langgaard.

Á Skipasmiðjuni á Skála, har 75 fólk arbeiða, merkja tey eisini, at minni er at gera.

– Arbeiðið minkaði nógv í heyst, og tá vóru seks mans uppsagdir ella funnu sær arbeiði aðrastaðni, men í hesum umfari hava vit ikki verið noyddir at siga fleiri fólki úr starvi, sigur Gunnar Mohr, stjóri á Skipasmiðjuni á Skála.



*Afturgongdin í ali- og fiskivinnuni ávirkar stóru smiðjurnar í Eysturoynni, tí nógva staðni verður spart uppá viðlíkahaldsarbeið. Fleiri smiðjur hava verið noyddar at siga fólki seinastu vikuna*